gult32 cyan32 magenta32 svart32



# Seismikkskip brúka Suðuroynna

ÚTGERÐARVIRKSEMI OG ÚTJAÐARIN

*Jan Müller*

Hóast oljufeløgini hava gjørt av at leggja útgerðarhavnina í Runavík er eingin forðing fyri, at útgerðarvirksemi í sambandi við komandi oljuleiting og seismikkkanningar annars ikki eisini kunnu vera aðrastaðni í landinum, eitt nú í Suðuroynni. Oljufelagið Anadarko, sum hevur 9-ára loyvi og føroyski stjóri tess



*Seismikkskip hava fyrr fingið vørur og tænastur í Suðuroynni.*



*Johan Mortensen, stjóri í Anadarko Føroyar hevur fylgt oljutilgongdini í fleiri ár heima sum burturi. Her er hann umborð á boripalli í Norðsjónum.*

*Myndir Jan Müller*

Johan Mortensen, ætla í hvussu er ikki at venda deyva oyrað til ynskini hjá suðuroyingum at fáa lut í komandi oljuvirksemi. Anadarko fer í juni og juli at gera seismiskar kanningar, og í hesum sambandi ætlar felagið, at reiðaríið, ið fær arbeiðið, skal arbeiða út frá Suðuroynni tvs. brúka havn har, tá tað skal hava olju, proviant, útgerð, skifta manning oa. Johan Mortensen, sigur, at hetta m.a. verður gjørt við politiska viljanum í huganum, um at "eisini útjaðarin skal hava lut í virkseminum". Hetta verður so eisini gjørt út frá teirri sannroynd, at vinnan í Suðuroynni er før fyri at veita slíka tænastu og sum er kappingarfør við onnur øki í landinum. Seismikkskip hava fyrr arbeitt út frá Suðuroynni. Anadarko fer í summar undir nýtt slag av seismiskum kanningum í royndini at loysa basaltknútin, tvs. at kunna síggja niður gjøgnum basaltið og vita, um møguligar oljukeldur kunnu vera har.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Hann frískar vindin upp í stívt andøvsgul av útsynningi. Um náttina lækkar hann niður í sunnan og veksur upp í ein strúk. Skýggjað og regn av og á. Hitin økist til millum 5 og 7 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Hann veksur upp í hvassan vind av suðri og útsynningi. Skýggjað og regn av og á. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi. Skýggjað og regn. Hitin umleið 6 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi. Skýggjað og nakað av regni. Hitin umleið 7 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 1 |
| Nuuk | 1 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 7 |
| Tromsø | 1 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 4 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | 6 |
| Moskva | 12 |
| Berlin | 5 |
| Warzawa | 9 |
| Kiev | 14 |
| Bukarest | 13 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 12 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 18 |
| Malta | 22 |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 17 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 28 |
| New York | 11 |
| Miami | 20 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 27 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 28 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Ein hátrýstryggur millum Bretsku Oyggjarnar og Ísland fer eystureftir.



Lágtrýst hava komandi dagarnar lýggja luft við sær sunnaneftir. Brúgvaløg við regni og vindi koma tætt fram við Føroyum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/04 kl. 06[00]–19/04 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 1,3°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 15,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: <0,1 mm – mált frá 18/04 kl. 06[00]–19/04 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 71,6 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

15. apríl: Seinna kvarter
17. apríl: Mánin longst frá jørðini
23. apríl: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. apr | 05.23 | 17.42 | 04.23 | 16.42 | 04.38 | 16.57 | 07.23 | 19.42 | 08.23 | 20.42 | 03.38 | 15.57 | 02.38 | 14.57 | 05.38 | 17.57 | 06.38 | 18.57 | 05.08 | 17.27 | 06.23 | 18.42 |
| 21. apr | 06.01 | 18.20 | 05.01 | 17.20 | 05.16 | 17.35 | 08.01 | 20.20 | 09.01 | 21.20 | 04.16 | 16.35 | 03.16 | 15.35 | 06.16 | 18.35 | 07.16 | 19.35 | 05.46 | 18.05 | 07.01 | 19.20 |
| 22. apr | 06.39 | 18.59 | 05.39 | 17.59 | 05.54 | 18.14 | 08.39 | 20.59 | 09.39 | 21.59 | 04.54 | 17.14 | 03.54 | 16.14 | 06.54 | 19.14 | 07.54 | 20.14 | 06.24 | 18.44 | 07.39 | 19.59 |
| 23. apr | 07.21 | 19.42 | 06.21 | 18.42 | 06.36 | 18.57 | 09.21 | 21.42 | 10.21 | 22.42 | 05.36 | 17.57 | 04.36 | 16.57 | 07.36 | 19.57 | 08.36 | 20.57 | 07.06 | 19.27 | 08.21 | 20.42 |